

*Cirkusið náddi hæddina, tá teir seinastu luttakararnir komu fram og sýndu fram teirra kynstur*

# Sirkus er í býnum...

**Hóast tey ikki sluppu til landið fríggjadagin, so eydnaðist tað kortini Sirkus Arena at hava tær tríggjar ætlaðu sýningarnar um vikuskiftið. Ein var leygardagin í Klaksvík og tvær sunnudagin í Havn og í Runavík**

SIRKUS
*Orð: Solby A. Eliasen*
*Myndir: Jens K. Vang*

Látur, róp og undran eru helst tey trý lyklaorðini ein kann nýta, tá upplivingin í Sirkus Arena um vikuskiftið skal lýsast.

Byrjað varð við sanginum um at cirkus er í býnum, sungin av forstandaranum, sum heilt frá byrjan av saman við klovninum, Pjerrot, megnaði at leggja lunnar undir eini sera hugnaligari og stuttligari løtu hjá øllum teimum mongu børnunum, sum vóru komin at hyggja. Har vóru jonglørar, klovnar, gandakallur og onnur, sum sýndu fram teirra kynstur. Øll royndu tey eisini á hvør sín hátt at fáa børnini við í teirra framførslu. Summi heittu á børnini um at rópa ella annað, meðan onnur beinleiðis tóku børn upp til sín og fingu tey at hjálpa til. Tað var eisini stuttligt at síggja, hvussu væl børnini skiltu alt, sum sagt varð.

Klovnurin Logo, sum gjørdi ballóndjór gleddu fleiri barnahjørtur enn meira, tá hann gav nøkrum børnum tey djórini, sum hann evnaði til.

Men tað er kortini vælskilligt, at onkur hevði hug at fílast á kostnaðin av atgongumerkjunum og minnislutunum. Tað var óivað ein sera dýrur dagur fyri summar famliljur. Og serliga tá hugsað verður um, at børnini høvdu hug at fara at keðast, tá komið var hálva leið, tí sýningin bleiv í longra lagi.

Cirkus Arena, sum var nakrar ferðir í Føroyum í áttatiárunum og í byrjanini av níti árunum, hevur ikki vitjað klettarnar í tíggju ár, men tey søgdu, at tey fegin vildu koma aftur til Føroyar í 2004, so tað verður spennandi at vita, um tey fara at leggja seg eftir at koma hendanvegin við styttri millumbilum í framtíðini.



*Børnini vóru sera hugtikin av tí blaðunga dansaranum, sum stóð oftari á hondunum enn á fótunum*



*Hesi bæði hugtóku øll við teirra øðrvísi dansi. Láturin rungaði í, meðan tey royndu at lumpa hvønn annan*



*Klovnurin hevði sera ilt við at bera kuffertið, men so fekk hann hjálp frá einum drongi, sum lættliga bar tað fyri hann*



*Tey bæði endaðu teirra framførslu við, at tey vórðu heysaði upp eftir hárinum, meðan tey jonguleraðu við tallerkum og øðrum*



# Ísland sum grøna kaka

**6. b í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík er við í eini kapping um at sleppa til Kópavág í Íslandi. Hvør flokkur skuldi gera eina verkætlan, og fríggjadagin var verkætlanin hjá 6. b liðug**

VERKÆTLAN
*Solby A. Eliasen*



*6. b og teirra Íslandskøka. Ein verkætlan, sum hevur tikið tríggjar dagar. Ikki færri enn 22 pakkar av flormelisi vóru nýttir til glaringina*

**Klaksvík:**
Tað vóru 22 sera errin børn, sum fríggjadagin lótu hurðina til flokshølið hjá 6. b upp fyri øllum, sum vóru áhugaði í at síggja teirra verkætlan. Har vóru nógv foreldur, og onnur duttu eisini inn á gólvið.

Mitt í flokshølinum á einum stórum borði stóð ein sera stór køka, sum avmyndaði Íslandskortið. Talan var um eina stóra grøna kaku, sum var dekkað við grønari glaring. Á køkuni sóust teir størstu jøklarnir og Hekla eisini. Næmingarnir høvdu nýtt køkuprýði at skriva tey kendastu støðini í Íslandi á. Og sjálvandi høvdu tey eisini merkt, hvar Kópavágur er. Jøklarnir vóru gjørdir úr róma, og teir stungu eitt sindur upp úr køkuni, so hon líktist uppaftur meira einum veruligum Íslandskorti.

Køkan var sera flott á at líta, men tá spurt varð, um hon mundi smakka líka væl, sum hon sá út, var svarið ivingarsamt. Tað var ikki tí, at tær yvir tjúgu skuffukøkurnar, sum mammurnar hjá næmingunum høvdu bakað, ikki smakkaðu nóg væl, men heldur tí at køkan hevði staðið í tríggjar dagar, meðan tey høvdu arbeitt upp á hana.

– Hon er nakað turr nú, og glaringin er sera tjúkk, so eg trúgvi ikki, at hon er etandi longur, segði Elly Johannesen, sum er lærari hjá 6. b.

– Vit hava nýtt 22 pakkar av flormelis, greiddu næmingarnir frá. Og tey løgdu afturat, at tað hevur verið sera stuttligt at arbeitt á henda øðrvísi háttin.

– Tað verður alvorliga rotið at fara í skúla aftur upp á vanliga mátan mánadagin, vóru tey øll á einum máli um.

### Torført, men stuttligt

At evna eina tílíka køku til er ikki bara sum at siga tað. Næmingarnir høvdu sum sagt eina køku í part við í skúla. Tey teknaðu eitt stórt Íslandskort, sum tey so settu allar køkurnar uppá í ein stóran fýrakant. Síðani varð farið at skera hana til. Tey greiða frá, at tað var sera torført at skera hana til, men við toli og handalagi gekk tað kortini. Síðani løgdu tey glaringina upp á og uppmerktu øll tey kendastu støðini í Íslandi. Úrslitið talar fyri seg á myndini.

### Men hvussu byrjaði so alt hetta?

Tað er ein kapping ímillum sættu flokkarnir í Klaksvík um at sleppa ein túr til Kópavág í summar. Klaksvík og Kópavágur eru vinarbýir, og er henda kappingin ein liður í teirra samstarvi.

Næmingar og lærari tosaðu saman í tímanum um, hvat tey skuldu finna uppá. Tey vórðu heilt skjótt samd um at gera Íslandskortið, men so ráddi tað um at finna útav, hvørjum tey skuldu gera tað úr. Fleiri góð uppskot vóru, millum onnur proppar og pappmasjé, men so var tað, at ein drongur í flokkinum, Hans Andreas, kom við hugskotinum at gera eina køku. Øll vóru við uppá tað, og síðani varð farið í gongd. Køkan varð samlað mikudagin, og fríggjadagin sýndu tey so fram teirra meistaraverk. Mynd varð tikin av henni, sum verður send til Havnar saman við verkætlanunum hjá hinum báðum sættu flokkunum. Har verður so avgjørt, hvør vinnur ferðina til Kópavág. Nær tey fáa at vita tað, vistu tey ikki at siga.

– Køkan verður helst standandi her inntil mánadagin, síðani fer hon vekk – ella fara vit at hugna okkum við eini sera turrari og søtari køku, segði Elly Johannesen at enda við einum smíli.

# Tey ungu í Klaksvík dansa aftur

**Tey ungu undir 18 ár í Klaksvík hava nú fingið ein møguleika til aftur at kunna fara í dans fríggjakvøld. Klaksvíkar klubbi hevur latið dyrnar upp fyri teimum ungu, sum ikki hava havt eitt dansistað síðani í desembur**

DANSUR
*Solby A. Eliasen*



*Jan Gardar er ein av teimum, sum hevur roynt at fingið eitt dansistað til tey ungu undir 18 ár. Og fríggjakvøldið kundi hann saman við nevndini lata dyrnar í Klaksvíkar klubba upp fyri teimum*

**Klaksvík:**
Klokkan var ikki farin meira enn av tíggju fríggjakvøldið, tá tey fyrstu ungu undir 18 ár fyri fyrstu ferð kundu trína inn í nýgjørdu og snotuligu dansihølini í Klaksvíkar klubba. Tey tóktust heldur smæðin í fyrstuni og tung at dansa við. Men sum fráleið út á kvøldið fyltust hølini við glaðum og vælnøgdum tannáringum, sum fegnaðust um henda møguleikan at sleppa í dans. Og tá so nýggi bólkurin úr Klaksvík Mind´s Eye, sum eisini hevur ognað sær ein møguleika afturat at sleppa í Prix Føroyar finaluna við at gerast nummar tvey í seinasta innleiðandi umfarinum, fór á pallin, kom rættuligt lív í ungdómin, og tey tustu út á dansigólvið.

Atburðurin hjá teimum ungu var sera góður, verður sagt úr Klubbanum, og tey fimm starvsfólkini hetta kvøldið høvdu sum so ongar trupulleikar.

Jan Gardar er dagligur leiðari í klubbanum, og tað er hann saman við nevndini, sum hevur tikið stig til hetta. Hann sigur, at kvøldið eydnaðist avbera væl, og at tey ungu skikkaðu sær heilt væl.

– So at siga ongin var nakað serliga ávirkaður, og tey lótu til at hugna sær, og tað er at fegnast um, sigur Jan, sum hevur skipað fyri dansi fyri teimum ungu undir 18 í Klaksvík tey seinastu mongu árini. Tað var eisini hann, sum stóð fyri dansinum í Lognbrá tann tíð tað var.

– Tað er mítt hjartabarn, um ein kann siga tað so, at skipa fyri dansi fyri teimum ungu, sigur Jan, sum heldur tey ungu vera meiri takksamari enn tey eldru, tá tað kemur til dans. Og hann er sera fegin um, at kvøldið eydnaðist so væl. Hann er ein av teimum mongu í Klaksvík, sum hevur verið sera harmur um, at ongin dansur fyri tey ungu hevur verið. Og hann tók stig til hetta saman við nevndini í klubbanum, men gjørt varð samstundis púra greitt fyri teimum ungu, at atburðurin kom at hava alt at siga. Hetta hava tey ungu so tikið til eftirtektar, tí ongin stórvegis trupulleiki var fríggjakvøldið.

Men Jan sigur, at hann hevur ikki tosað við grannarnar enn, so hann veit ikki at siga, um tey vórðu órógvað av teimum ungu hesa náttina. Men Jan hevur ætlanir um at tosa við grannarnar, og fundur verður eisini, har eftirmeting verður gjørd av kvøldinum. Um 150 ung vóru í dansi í klubbanum fríggjakvøldið, og eftirsum at tað eydnaðist so væl, so verður tað helst soleiðis framyvir í Klaksvíkar klubba, at tey ungu eiga dansigólvið fríggjakvøld, meðan tey meiri tilkomnu fáa leygarkvøldið.